# Lønin er látur



*– Her í Klaksvík havi eg lært, at leikararnir hugsa fyrst um arbeiði, síðani seyð, so sjónleik og so familjuna, sigur Jákp Veyhe argandi. Hann leikstjórnar nýggjum leiki hjá klaksvíkingum*

**– Vit hava vant sera hart, og krøvini til leikarnar hava verið stór. Men tað er neyðugt, skalt tú hava ein góðan leik. Lønin er látur, sigur Jákup Veyhe, sum leikstjórnar nýggja leikinum hjá Klaksvíkar Sjónleikarfelag**

SJÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Leikarar í Klaksvíkar Sjónleikarfelag hava síðani fyrst í september vant miðvíst við nýggja leikinum, sum skal frumsýnast um 10 dagar.

– Tað hevur verið sera strævið hjá leikarunum, tí vit hava vant seks kvøld um vikuna. Men tað er neyðugt at venja nógv fyri at fáa leikin at sita, sigur Jákup Veyhe, sum er leikstjóri fyri nýggjan leikin.

– Vit eru í kapping við annan sjónleik í Føroyum, við bigograf og sjónvarp, og tí skulu vit hava ein góðan leik, um vit skulu geva okkum vónir um at fáa nógv fólk til leikin, sigur hann.

– Men eg skal viðganga, at tað hava verið løtur, har vit hava verið eitt sindur strongd av hørðu venjingini, og onkur er farin heim í ringum lag.

## Royna leikin aftur

Leikurin, sum klaksvíkingar nú fara at spæla, kallast Mostir Charley. Hann er áður spældur í Klaksvík undir navninum Charles Tanta og var sera væl dámdur. Tað hava verið júst 44 ár millum sýningarnar av leikinum.

Nú eru tað nýggir sjónleikarar, sum spæla leikin, og ein nýggjur leikstjóri hevur møguleika at krydda við sínum egna pipari og salti.

– Hetta er ein farsa við skjótum replikkin, og tí er tað umráðandi, at leikurin er væl smurdur, og at ferð er á, sigur Jákup Veyhe.

Tað var Brandon Thomas, sum skrivaði leikin fyri meira enn hundrað árum síðani, og leikurin verður mettur sum ein klassikari millum skemtileikir. Andreas Justesen hevur gjørt nýggja týðing av leikinum.

– Avbjóðingin er at fáa ein leik frá 1892 stuttligan í dag. Vit hava roynt at gjørt ein leik, har vit spæla nokk so ógvusliga og kanska gera ov nógv av í ávísum støðum, sigur leikstjórin.

## Góður felagsskapur

Jákup Veyhe hevur fingist nógv við sjónleik, men mesta av hesum arbeiðnum hevur verið í høvuðsstaðnum. Hetta er fyrsu ferð, at hann fæst við sjónleik í Klaksvík.

– Klaksvík er eitt sindur bygdalig upp á ein positivan máta. Fólk kenna hvønn annan betri her, og tey vita meira um hvønn annan, sigur Jákup Veyhe.

– Eg haldi eisini, at Klaksvíkar Sjónleikarfelag er meira eitt felag enn Havnar Sjónleikarfelag. Her í Klaksvík eru nógv fólk uttan um felagið, summi koma við kakum, og tað eru nógv sum detta inn á gólvið, sigur hann.

Venjingarnar hava verið nógvar í tali, síðani leikstjórin kom til Klaksvíkar fyrst í september mánaði.

– Hesin leikurin krevur nógv av leikarunum, men soleiðis má tað vera, um tú skalt hava ein leik at sita upp á einar 10 vikur, sigur hann.

– Her í Klaksvík havi eg lært, at leikararnir hugsa fyrst um arbeiði, síðani seyð, so sjónleik og so familjuna.

## Eisini álvari

Klaksvíkar Sjónleikarfelag spældi seinasta vetur Ibsenleikin Afturgongur, sum var ein álvarsleikur. Tað vóru ikki eins nógv fólk til hendan leikin, sum tað plaga at verða til skemtileikirnar hjá felagnum.

Nú eru klaksvíkingar so farnir aftur at spæla skemtileik, sum teir eisini eru kendir fyri at duga at spæla.

– Góðir skemtileikir draga fólk, og eg haldi, at tað er umráðandi at spæla skemtileikir. Men sjónleikarfeløgini skulu eisini royna at spæla meira álvarsamar leikir, heldur Jákup Veyhe.

Nú fara teir 11 leikararnir í leikinum at fáa seinastu partarnar av leikinum upp á pláss, so alt kann verða klárt 10. november, tá frumsýningin verður í Atlantis.

– Tað hevur verið sera strævið hjá leikarunum, men lønin er látur, sigur Jákup Veyhe.



*Jan Gardar er ein av leikarunum í leikinum Mostir Charley*



# Vit eru høvuðsdyrnar

**Føroyar eru ikki nakrar bakdyr hjá úrnorðurlendsku grannunum í norðurlendskum samanhangi. Vit eru høvuðsdyrnar, og havið er lykilin, segði løgmaður í røðu á Norðurlandaráðsfundi í Keypmannahavn**

UMHVØRVISSAMSTARV
*Edvard Joensen*



*Anfinn Kallsberg, løgmaður, tosaði um reint havumhvørvi og samstarv í Norðuratlantshavi á Norðurlandaráðsfundinum í Keypmannahavn mánadagin, har nýggi norski forsætisráðharrin, Kjeld Magne Bondevik, eisini var staddur*

*Savnsmynd frá vitjan løgmans í Noreg*

Tað er tað reina havið, sum vit skulu brúka til at gera vart við okkum úti í heimi, segði løgmaður tá hann helt røðu á Norðurlandaráðsfundinum í Keypmannahavn mánadagin, har hann tosaði um umhvørvi og reina havið kring Føroyar.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, vísti á, at umhvørvi og umhvørvispolitikkur er nakað, sum sermerkir Norðanlond bæði innanhýsis og úti í heimi. Serliga internationalt verða Norðanlond høgt mett fyri arbeiði teirra fyri einum reinum og burðardyggum umhvørvi.

Føroyingar virðismeta hendan politikkin og vilja fegnir vera partur av honum og taka ábyrgd fyri honum, segði løgmaður millum annað.

Hann vísti á, at fyri okkum her uppi í Norðuratlantshavi er reint havumhvørvi og gangnýtsla av havsins tilfeingi tvær síður av somu søk. Vit kunnu ikki tosa um annað uttan at tosa um bæði, segði løgmaður. Tey eru stutt og greitt lívgrundarlag okkara, samstundis sum tey eru ein norðurlendskur og alheims arvur, sum vit hava stóra ábyrgd av at brúka optimalt og varða um í framtíðini.

Tað er ikki mótstríðandi at tosa um umhvørvisvernd og gagnnýtslu av tí tilfeingi, havið gevur, vísti løgmaður á. Tað er logikkur, og beinleiðis lívsneyðugt, segði hann.

Hann vísti á, at tað er ein sera stór avbjóðing til okkum og grannar okkara sum fiskivinnutjóðir í Norðuratlantshavi. Hini Norð-urlondini eiga at skilja, at tað hevði verið ábyrgdarleyst, um vit ikki á ein skynsaman hátt gagnnýta alt tað tilfeingi, sum bæði nú og í framtíðini er møguligt at fáa hendur á.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, vísti í røðu síni á, at hesin hugsunarháttur ikki er nakað serføroyskt fyribrigdi. Hetta er samsvarandi tí, allir norðuratlantisku grannar okkara hugsa. Tað verið seg írar og skotar, íslendingar og grønlendingar eins og íbúgvarnir fram við Kanadisku eysturstrondini.

Eisini hini Norðurlondini eiga at gera nýtslu av hesum tilfeingi, segði løgmaður.

Hann vísti á, at vit eiga í felag at gera umheimin varugan við, at hendan stóra, bláa fløtan, vit liggja mitt í, er annað enn bara eitt øki, sum tað tekur einar fimm tímar at flúgva tvørtur yvir á ferð millum Europa og Norðuramerika.

– Norðuratlantshavið er eitt lívsgrundarlag og ein týðandi miðdepil fyri menniskju og mentanir. Eitt norðurlendsk meirvirði, sum Norðanlond hava felags við grannarnar fyri vestan, segði løgmaður.

Annfinn Kallsberg endaði røðu sína á Norðurlandaráðsfundinum í Keypmannahavn við at vóna, at politisku leiðararnir í Norðanlondum fara at virka við til at byggja út og styrkja samstarv og kjak millum samfeløgini í Norðuratlantshavi.

# Kleyvarskapur í Milano

**Syndarliga flogvanlukkan í Milano herfyri stóðst av menniskjansligum mistøkum hjá flogleiðarunum, sigur kanningarnevndin, sum kannar vanlukkuna**

FLOGVANLUKKA



Tað vóru menniskjnanslig mistøk, ið elvdu til SAS vanlukkuna í Milano, sum herfyri kostaði 118 mannalív. Flogleiðararnir ansaðu ikki nóg væl eftir, sigur italska kanningarnevndin, sum harvið leggur alla ábyrgdina á italsku loftferðslumyndugleikarnar.

Danska blaðið Berlingske Tidende skrivar, at tað kundi verið sloppið undan samanstoytinum millum SAS flogfarið og tað lítla, týska Cesna flogfarið, um flogleiðararnir í torninum á flogvøllinum høvdu lurtað eftir flogskiparunum á lítla, týska flogfarinum, meðan tað var á veg út gjøgnum mjørkan í Milano hendan morgunin. Ikki færri enn tríggjar ferðir áttu flogleiðararnir at havt steðgað týskarunum og sent ein »follow-me« bil út á vøllin til flogfarið, sigur kanningarnevndin sambært Berlingske Tidnde.

Týsku flogskipararnir høvdu varhugan av, at okkurt var galið, og settu seg ikki færri enn tríggjar ferðir í samband við tornið, sum kortini lat teir halda fram.

Hesir nýggju upplýsingarnir eru komnir fram, eftir at kanningarnevndin hevur lurtað eftir bondunum, har samrøðurnar millum lítla, týska Cesna flogfarið og eftirlitstornið vórðu tiknar uppá, skrivar Berlignske Tidende.

**ej**

# Fótbólt við smíli

**Norðurlendsku stjórnarleiðararnir styðja norðurlendsku royndunum at sleppa at hýsa europameistarakappingini í fótbólti 2008**

SAMSTARV

Norðanlond ætla at brúka látur og smíl sum vápn fyri at sleppa at hýsa europameistarakappingini 2008. Og ikki óvæntað fáa fótbóltssambondini fullan stuðul frá stjórnarleiðarunum, sum eru á Norðurlandaráðsfundi í Danmark í hesum døgum.

– Hetta er ein stór ítróttarlig avbjóðing fyri Norðurlond. Tað er hugaligt, at fótbóltssambondini arbeiða saman um hesa uppgávuna, og tí stuðla vit av fullum huga, sigur finski forsætisráðharrin, Paavo Lipponen.

Við støði í kendu donsku roligans fara norðurlendsku fótbóltssambondini at virka fyri at fáa tiltakið hedanveg við at fáa gleðina aftur í fótbóltsspælið.

– Vit vilja hava familjuna aftur á fótbóltsvøllin. Fólk skulu hava tað stuttligt, og vit fara at seta upp smílimiðstøðir við allar vallirnar, har dystirnir verða leiktir, sigur Pertti Atja, sum er limur í nevndini, sum arbeiðir fyri norðurlendsku ætlanini.

Gjørt verður av í december komandi ár, hvar kappingin verður. Umframt Norðurlond søkja eisini Sveis-Eysturríki, Ungarn, og Skotland um at sleppa at verða vertir, eins og Grikkaland og Turkaland eisini søkja í felag.

**ej**

# Ótryggleiki um Sellafield

**Á Norðurlandaráðsfundi í Keypmannahavn hava norðurlendsku stjórnarleiðararnir gjørt vart við ótryggleika um bretskt kjarnorkuavfall**

UMHVØRVI

Norðurlensdku stjórnarleiðararnir hava sagt seg vera ótryggar viðvíkjandi bretska kjarnorku endurvinningarverkinum Sellafield. Teir óttast fyri, at geislavirknir lekar kunnu fara at skaða strandaumráðini nærindis verkinum.

– Tað er eingin ivi um, at ótryggleikin um lekar er stórum hjá íbúgvunum fram við strondunum nærindis Sellafield, staðfesti norski forsætisráðharrin, Kjeld Magne Bondevik á tíðindafundi í samband við Norðurlandaráðsfundin.

Hann nevndi, at Norðanlond nú í felag samstarva gjøgnum umhvørvisráðharrar sínar við slíkum málum, samstundis sum hann vísti til konventiónina frá 1998, sum ásetir reglur fyri, hvussu spurningar av hesum slagnum skulu handfarast í altjóða høpi.

Stjórnarleiðararnir viðgjørdu eisini norðurlendska skipaferðslu við serligum atliti til ta aktuellu kreppuna, sum stóra norska Kværnersamtaki í løtuni er í.

**ej**